Fylgiskjal 13

LM-099/2023

Annika Petersen

Fra: Kvívíkar Kommuna <kvivik@kvivik.fo>
Sendt: 20. februar 2024 14:32
Til: VMR-Journal
Emne: Viðmerkingar til ferðavinnulógina

Góðan dag Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Kvívíkar kommuna hevur hesar viðmerkingar til ferðavinnulóggávu

Kvívíkar k□mmuna sær tað ikki sum nakað gagnligt fyri k□mmununa, um vit skula fáa inna-landsferðavinnu álagt k□mmununum, at taka □kkum av. Hetta verður ein stór fíggjarlig byrða hjá Kvívíkar k□mmunu, □g fyrisitingarliga meta vit, at hatta krevur millum eitt hálvt □g eitt heilt ársverk afturat í umsitingini, sum í dag er 2,2 ársverk. Innanland-ferðavinna hevur, eftir □kkara fatan, altíð verið □g má framyvir vera verandi ein landsuppgáva.

K□mmunurnar eru til fyri at veita b□rgarum tænastu, □g ikki vinnu ella ferðavinnu.
Í □kkara k□mmunu eru □ngar ferðavinnufyritøkur. Tað eru nógvir túrar gjørdir í □kkara k□mmunu, men í tað er næstan alt fyritøkur uttanfyri □kkara k□mmunu, sum k□ma til □kkara við gangitúrum, busstúrum □g annað.
Ein skipa ferðavinna vil geva møguleikar fyri summi. Men fyri teimum, sum vara av uttangarðsjørð, k□ma at hava ávísan ampa av gangitúrum, sum ikki eru fráb□ðaðir.

Kvívíkar kommuna undrast eisini á, at Búnaðarst□van ikki er nevnd í uppsk□tinum.

Kvívíkar k□mmuna hevur fylgjandi viðmerkingarnar til lógaruppsk□tið:
(teksturin við skráskrift er tikin úr kunngerðartekstinum)

§4
Stk. 2. Loyvt er at brúka bát á vøtnum og í stutta tíð at draga smábát upp á strondina og brúka bátabrúgv og tílíkt, um hetta ikki er eigara ella brúkara til órímiligan ampa.
Um ein bátabrúgv er privat ogn, er tað so rímiligt, at ein og hvør kann brúka hesa privatu ognina?

Stk. 4. Ikki er loyvt at hava hund við sær uttangarðs uttan í sambandi við landbúnaðarvirksemi.
Seyðahundasambandi er limur í ISF og eru seyðahundakappingar ein ítróttargrein, sum fyri ein stóran part hevur venjingar og kappingar uttangarðs. Hendan ítróttargreinin verður skerd munandi um hon bert kann útinnast innagarðs.
Venjingar hjá løgreglu við hundi eru helst eisini partvís uttangarðs.
Í okkara kommunu eru javna borgara, sum ganga túrar fram við landsvegi við hundi í bandi. Sum dømi kann nevnast, at ganga millum bygdirnar ella fram á Leynavatn og heimaftur. Hetta verður ikki loyvt sjálvt um festari, bóndi ella ognari av jørðini er játtandi fyri hesi gongd.

§5
Her verður staðfest at eigari ella brúkari ikki kann siga nei til handilsliga ferðavinnu, men kann krevja ein standardavtala verður gjørd av landstýrismanninum frammanundan. Hendan standardavtala er okkum ókend og kunnu vit ikki fyrihalda okkum til hana sum nú er.
Tað verður neyvan gjørligt at gera eina standard avtalu, sum dekkar alla ferðavinnu og øll øki í landinum.

§6
Allar kommunur skulu, saman við serstøku ella staðbundnu nevndini sbr.§7, og í samráð við eigara ella brúkara, gera eina ferðavinnuætlan
Ferðavinnuætlanin skal røkka út á kommunumark tvs. At ætlanin má samskipast og samsvara við ætlanina hjá grannakommununum.
Ikki ber til at fyrihalda seg til eina ókenda kunngerð um ferðaleiðara.

§7
Í kvívíkar kommunu eru 5 bygdir. Førir hetta við sær 5 nevndir, ið skulu umsita peningin, sum kemur inn til bygdina.

§8
Hetta kann ikki vera ein uppgáva sum kommunan skal fíggja.
Innanlands ferðavinna eigur, at rinda fyri tær útreiðslur og íløgur sum eru neyðugar fyri at tey kunnu virka og ikki skattaborgarar í kommununum.

§9
Her verður ferðavinnan tikin framum, ognarar, festara og bøndur. Festarar og bøndur hava skyldu at røkja hagarnar og ikki ferðavinnan.

§10
Er tað rímiligt at landið skal eiga alla uttangarðsjørð har ferðavinnan ávirkar landbrúki so mikið nógv, at tað ikki longur ber til at reka landbrúksvirkseminum. Hvat skal landið við jørðini?

§11
Ikki ber til at fyrihalda okkum til ókendar kunngerðir.

§12
Ikki ber til at fyrihalda okkum til ókendar kunngerðir.

§13
Ikki ber til at fyrihalda okkum til ókendar kunngerðir.

§14
Í viðmerkingunum til §14 verður sett upp eitt roknistykki sum vísir at metta inntøkan, sum verður til at býta er 20 mió kr. ¾ eru at býta til kommunur og bygdirnar.
Onki er endaliga lýst, hvussu hetta skal býtast millum kommunurnar.

Lítið er av ferðavinnu, sum hevur heimstað í Kvívíkar kommunu, og tí er tað sera ivasamt hvat verður vekta til okkara kommunu av ferðafólkagjaldinum.

Um vit siga at peningurin verður býttur eftir fólkatalið, so er roknistykkið umleið 15.000.000 kr / 55.000 landsfólk x 600 kommunuborgarar. Tað vildi givið okkara kommunu 163.000 krónur.
Hetta hevði kanska dekk lønarkostnaðin til eyka fyrisiting í kommununi.
So væntar pengar til alt annað, sum eftir lógaruppskotinum verður álagt kommununum.

Vit seta ein stóran spurning til, hvussu gjaldið skal býtast millum kommunurnar.

Tað verður stutt sagt ikki møguligt hjá kommununi at rinda fyri álagdar uppgávur í § 8.
Her verður ikki samsvar millum útreiðslurnar hjá kommununi, og tað sum kommunan fær innaftur frá ferðafólkagjaldinum.

Kvívíkar kommuna sær ein stóran fíggjarligan ampa av, um hendan kunngerð kemur í gildi.

LM-099/2023

Vinarlig heilsan
Kvívík k□mmuna

Hans Jóhann Sørensen
B□rgarstjóri



KVÍVÍKAR KOMMUNA

Frammi í Gerði 1.
FO-340 Kvívík
Tlf. +298 66 24 00
Fartlf. +298 29 24 02
hjs@kvivik.fo
www.kvivik.fo

"Øll málsviðgerð hjá Kvívíkar kommunu er fevnd av dátuverndarlógini. Kunning um dátuvernd er at finna her."

Hans Jóhann Sørensen,
borgarstjóri